# Jákup bíðar

**Leygardagin kom Jákup á Borg aftur úr Crewe Alexandria, men enn hevur hann einki frætt aftur frá felagnum**

YRKISFÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seinasta mánadag fór B36- og landsliðsleikarin, Jákup á Borg, á vikulanga ferð til enska felagið, Crewe Alexandra, sum heldur til í triðbestu ensku røðini.

Í eina viku vandi Jákup við felagnum, umframt at hann eisini leikti ein dyst við eykaliðnum hjá Crewe.

Sambært heimasíðuni, www.teamtalk.com, fekk Jákup góð skoðsmál fyri avrikið í dystinum, men sjálvur var landsliðsleikarin eitt sindur ivasamur, tá vit sunnudagin fingu orðið á hann.

- Tað var eitt sindur misjavnt, hvussu gekst. Undir venjingunum helt eg ikki sjálvur, at tað gekk so øgiliga væl, men venjarin lat hampuliga væl at, so verri enn tað, var tað so ikki. Undir dystinum var eitt sindur øðrvísi. Enski spælistílurin ger, at bakkarnir skulu koma nógv upp við, meðan miðvallararnir trekkja inn í vøllin, og tað venur tú ikki við efgir bert einum dysti.

- Akkurát, hvat meira hendir, dugi eg ikki at síggja. Enn er so stutt fráliðið, og eg havi so ikki hoyrt nakað, so vit fáa at síggja, hvat hendir, sigur Jákup á Borg at enda.



*Hóast hann ikki lat alt ov væl at sjálvur, so varð Jákup á Borg róstur fyri avrik sítt á enska fótbóltsportalinum, www.teamtalk.com*

# Fótbóltsfundurin um tríggjar vikur

Árligi fundurin, sum nevndin í Fótbóltssambandinum plagar at hava saman við umboðum fyri feløgini, verður í hesum mánaðinum. Upprunaliga var fundurin ásettur at vera leygardagin 16. november, men nú er hann útsettur til leygardagin 23. november.

Fundurin hevur nógvu tey seinastu árini verið fastur táttur í fótbóltsárinum. Á skránni er eftirmeting av farna fótbóltsárinum og orðaskifti um møguligar broytingar í reglum, ásetingum og kappingum. Feløgini og nevndin í FSF síggja fundin sum sera týdningarmikið forum. Á aðalfundinum, sum verður seinni á vetrinum, verða formligu avgerðirnar tiknar, men tað er ofta á fundinum í november, at tað verður avgjørt, um broytingar skulu gerast, og hvørjar tær skulu vera.

Fyri at fundurin framvegis skal hava týdningin, sum hann hevur havt, so er tað neyðugt, at formenninir og høvuðsvenjararnir møta á fundinum. Harvið verður tryggjað, at tað verða tey, sum hava ábyrgd og heimild at umboða feløgini, sum eru við, har tað verður tosað og samskift, og har grundarlag undir avgerðunum verður lagt.

Ársaðalfundurin hjá Fótbóltssambandinum hevur tey seinnu árini verið síðst í februar ella har á leið.

**-jh**

7. og 8. umfar:

# Tap og stórsigur



*Heini Olsen slapp loksins at telva við hvíta fólkinum leygardagin, og við álopsspæli frá fyrsta leiki var hann við til at tryggja størsta føroyska sigurin á talv-olympiaduni higartil*

**Úrslitini hjá føroyska talvlandsliðnum hava verið eitt sindur misjøvn um vikuskiftið. Annan dagin tapti liðið og bara nærlagni fra John Rødgaard og Heina Olsen syrgdi fyri at tað ikki bleiv til skrædl. Men leygardagin gekk hinvegin nógv betri og Føroyar vunnu stórsigur**

TALV-OL
*Jákup Sørensen*

**Bled:** Undan dystinum móti Eysturríki vóru føroysku telvarnir komnir eftir, at teir høvdu sett nýtt met. Ongantíð fyrr hevur nakað føroyskt lið vunnið 3 dystir á rað, og bara einaferð fyrr er tað hent, at liðið ikki hevur tapt í fimm dystum.

So hugurin var sera góður undan dystinum og ikki var sørt, at teir væntaðu sær gott úrslit.

Men so skuldi ikki ganga. Eysturríkarnir vóru sterkari á øllum borðunum og sýndu tað eisini. Teir vóru eirindaleysir. Føroysku telvarnir vóru við undirlutan og noyddust at stríðast alt talvið fyri hvørjari finnu. John Rødgaard og Heini Olsen komu tó heilskalaðir úr stríðnum og stríddu seg til javnleik. Eyðun Nolsøe kom illa fra byrjanini og kom ikki fyri seg aftur í øllum talvinum. John Arni var sær sjálvum líkur og stríddist alt talvið, men var noyddur at leggja kongin eftir fleiri enn 80 leikir.

Telvarnir máttu bara sanna at tess longur tú hevur hug at stinga nøsina fram, jú harðari verður mótstøðan. Undan dystinum vóru Føroyar á 57. plássi, men eftir 3-1 tapið fyri Eysturríki endaðu vit heilt afturi 84. plássi.

### Móti IPCA

Umframt tey 138 londini, sum eru umboðað á talv olympiaduni hava eisini trý sersambond eisini rætt til umboðan. Einum av hesum sersambondum skuldu Føroyar telvað móti leygardagin, tað var liðið hjá talvsambandinum fyri rørslutarnað.

Hetta liðið er styrkismett nakað omanfyri Føroyar. Teir hava fleiri altjóða meistarar á liðnum, so føroysku telvarnir vóru ikki heilt ekkaleysir, tá ið teir fóru at telvað. Sambært ratingtølunum var tað bara John Rødgaard, sum var betri fyri enn mótstøðumaðurin, men leygardagin eydnaðist alt tað, sum ikki gekk eftir vild í dystinum móti Eysturríki.

### John noyddist inn

Ætlanin var ikki, at John Rødgaard skuldi telva leygardagin, men hann varð noyddur at koma inn aftur á liðið, tá ið ein av telvaranum gjørdist sjúkur.

John líkt so kláraði hann at fyrireika seg í einari knappari vending og helt javnleikin við svarta fólkinum. Nú var botnurin lagdur undir sigrinum.

Næstur at reisa seg frá borðinum var John Arni Nilssen. Mótstøðumaðurin var altjóða meistari og hevði 2423 í rating. John Arni spældi trygt allan vegin og hin hevði lítið at svara aftur við, tá ið John Arni fór í álop.

Í 8. umfari slapp Martin Poulsen at vísa hvør dugur var í honum og sigast kann, at hann rættuliga tók hendan møguleikan. Mótstøðan var krútsterk, ein ukreini við ikki minnið enn 2355 í rating, men tað gjørdi einki hjá Martini, hann snøgt sagt smurdi mótstøðumannin av í einum sera góðum talvi. Eftir talvið kann bara staðfestast, at liðskiparin Rani Nolsøe hevur fingið ein positivan trupulleika, tí tað verður ringt at lata Martin sita uttanfyri eftir avrikið móti IPCA.

### Heini við hvítum

Heini Olsen var seinasti maður, sum reisti seg frá borðinum. Hann var nú endiliga sloppin at royna seg við hvíta fólkinum. Seinastu 4. umførini hevði hann telvað við svørtum, so honum longdist eftir at sleppa at royna seg við hvítum og sleppa í álop. Tað fór Heini eisini, men kortini ikki treytaleyst, hann telvaði seg spakuliga til fyrimun og vann at enda talvið trygt.

Heini Olsen helt eftir dystin, at stórsigurin leygardagin var grundaður á, at hugurin hjá telvarunum var nógv betri og at lagið bleiv so óføra gott, tá ið allir høvdu avgerðandi fyrimun.

3,5-0,5 sigurin móti IPCA er stórsti sigurin, sum Føroyar hava vunnið higartil í kappingini.

Føroyar hava 17 stig fyri 8. umfør og tað merkir at teir eru á einum 52. plássi.

Umframt IPCA eru eisini lið frá talvsambandinum fyri Braille telving, tað eru tey sjónveiku og blindu og eitt lið frá talvsambandinum fyri deyvar telvarar.

Í 9. umfarinum, mánadagin, telvaðu Føroyar móti Kolumbia, sum er styrkismett, sum nummar 56. Liðið sum telvaði var hetta: John Arni Nilssen, John Rødgaard, Heini Olsen og Martin Poulsen



UTTAN ÚR HEIMI

# Fyrsti flokkur fór til gravar

**Tey flestu børnini, sum doyðu í jarðskjálvtanum í italsku bygdini San Giuliano di Puglia, vóru seks og sjey ára gomul**

JARÐSKJÁLVTI
*Árni Joensen*

Nú er eingin fyrsti flokkur í San Giuliano di Puglia.

Luca, Morena, Valentina, Michele, Paolo vóru seks ára gomul eins og fleiri av hinum børnunum. Tey elstu vóru sjey ár, og tey gingu øll í fyrsta flokki í skúlanum í bygdini.

Øll doyðu í jarðskjálvtanum seinasta hósdag. Tey vóru í skúlastovuni, tá jarðskjálvtin kom. Seks sekund seinni hevði skjálvtin javnað skúlan við jørðina.

Leygarmorgunin fóru tey til gravar. Millum teirra, sum fylgdu, var italski forsetin, Carlo Azeglio Ciampi, og jarðarferðin varð send beinleiðis í sjónvarpinum.



*Bjargingarmenn og løgreglumenn bóru nøkur av teimum 26 skúlabørnunum í San Giuliano di Puglia til gravar*

### Sorg og øði

Líka síðani jarðskjálvtan hava fólk funnist at myndugleikunum á staðnum og teimum ovaru myndugleikunum, tí onkur má átaka sær skyldina av tí, sum hendi. Tí tað er greitt, at skúlin leyk als ikki tær byggireglur, sum eru galdandi fyri slíkar bygningar í einum jarðskjálvtaøki.

Ákæruvaldið er eisini farið at kanna, hví skúlin rapaði, meðan aðrir bygningar, sum stóðu tætt við skúlan, ongan skaða fingu.

- Tað er ikki rætt, at ein tílíkur bygningur rapar, og tí mugu vit finna tann ella teir, sum hava ábyrgdina, segði Andrea Catali, ákæri í Larino í gjár.

# Netanyahu krevur nýval

**Í Ísrael hevur Ariel Sharon boðið fyrrverandi forsætisráðharranum, Benjamin Netanyahu, starvið sum uttanríkisráðharri, men hann vil heldur hava nýval**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*

Eftir at Arbeiðaraflokkurin tók seg úr ísraelsku stjórnini, bað Ariel Sharon, forsætisráðharri fyrrverandi stjórnarleiðaran, Benjamin Netanyahu, taka við sum uttanríkisráðharri eftir Shimon Peres. Netanyahu játtaði, men við terri treyt, at Sharon skal skriva út nýval um stutta tíð.

Tað vil Sharon ikki gera, og í gjár váttaði Reuven Rivlin, ráðharri, at Sharon kann ikki ganga kravinum frá Netanyahu á møti.

Stuðlar hjá Sharon siga, at kravið hjá Benjamin Netanyahu hevur einans til endamáls at fáa Ariel Sharon frá, so Netanyahu sjálvur kann taka við sum leiðari í Likud-samgonguni og harvið gerast forsætisráðharraevnið hjá Likud.

Veljarakanningar hava fyrr víst, at Netanyahu hevði vunnið á Sharon, stillaði hann upp.

# Islamistarnir vunnu stórsigur

**Islamistiski flokkurin AK vann stórsigur á tjóðartingsvalinum í Turkalandi og kann skipa stjórn einsamallur**

VAL Í TURKALANDI
*Árni Joensen*

Tá atkvøðurnar aftan á tjóðartingsvalið í Turkalandi sunnudagin vórðu upptaldar, hevði tann nútímans islamistiski flokkurin AK fingið 34 prosent av atkvøðunum og 363 av teimum 550 tjóðartingsumboðunum.

18 flokkar stillaðu upp til valið í Turkalandi, men bara tveir teirra fingu nóg mikið av atkvøðum til at fáa umboð í tinginum. Minstamarkið í Turkalandi er heili 10 prosent, og tað vóru bara AK og tann sosialdemokratiski fólkaflokkurin CHP, sum rukku upp um markið. CHP fekk 19 prosent av atkvøðunum.

Politiskir eygleiðarar í Ankara vænta, at tey politisku viðurskiftini í Turkalandi verða óstøðug. Hetta kemst av, at formaðurin í AK, Recep Tayyip Erdogan, hevur fyrr fingið ein dóm fyri at hava eggjað fólki til átrúnaðarligan uppreistur. Hann slapp tí ikki at stilla upp til tjóðartingsvalið, og hann kann heldur ikki gerast stjórnarleiðari, nú flokkur hansara hevur vunnið.

Sjálvur sigur Erdogan, atflokkurin er til reiðar at stýra Turkalandi burtur úr teirri stóru búskaparkreppuni, sum landið er í, og at flokkurin er sinnaður at snara Turkalandi nærri Evropa.

# Ríkmaður rindar

Ein av teimum umstrídu ríkmonnunum í Russlandi, Boris Beresovskij, hevur boðið sær til at rinda verjunum, sum skulu royna at sannføra donsku myndugleikarnar um, at teir eiga ikki at lata russum tann varðhaldsfongslaða kekenska politikaran Akhmed Zakajev. Í gjár segði Boris Beresovskij við eina útvarpsstøð í Moskva, at hann og hjálparmenn hansara hava biðið fleiri kendar sakførarar í Bretlandi og Niðurlondum verja Zakajev.

Beresovskij er ein umstríddur maður. Hann var varaskrivari í trygdarráðnum hjá fyrrverandi russiska forsetanum Boris Jeltsin undir teirri fyrri kreppuni í Kekenia í 1997 og 1998, og tað eru mong, sum halda, at hann hevur ikki so reinar hendur, sum hann letst hava.

Samstundis sum Akhmed Zakajev situr í varðhaldi í Danmark, hava russar boðað frá, at teir fara at herða hernaðartiltøkini ímóti teimum kekensku uppreistrarmonnunum. M. a. hevur herleiðslan boðað frá, at hermenn, sum skuldu sendast heim til Russlands nú, verða verandi í Kekenia fyribils.

# Fær úr at gera

Norski Arbeiðaraflokkurin fer á landsfundi fyrsta dagin at velja fyrrverandi forsætisráðharran Jens Stoltenberg til formann, men beint undan fundinum vísir ein veljarakanning, at hann fær úr at gera.

Kanningin, sum Dagbladet kunngjørdi um vikuskiftið, vísir, at bara 19,3 prosent av veljarunum høvdu atkvøtt fyri Arbeiðaraflokkinum, var stórtingsval nú. Tað er 1,8 prosent í afturgongd samanborið við seinastu kanning.

Jens Stoltenberg viðgongur, at úrslitið er vánaligt. Hann sigur, at flokkurin fer at leggja dent á at vísa, at hann er tann besti, tá tað snýr seg um vælferðina og um at útvega fólki arbeiði.

Framburðsflokkurin, sum hevur verið nógv tann størsti flokkurin í øllum veljarakanningum seinastu mánaðarnar, fær stóra framgongd í teirri nýggju kanningini. Flokkurin fær heili 5,2 prosentstig afturat og hevur nú 32,5 prosent av veljarunum aftan fyri seg.

# Demokratarnir stavnin frammanfyri

Tær seinastu veljarakanningarnar undan ávegis valinum í USA í dag vísa, at demokratarnir liggja stavnin framman fyri republikanar-arnar, men munurin er so lítil, at alt kann henda.

Sambært kanningunum verða tað teir fimm statirnir New Hampshire, Arkansas, South Dakota, Missouri og Colorado, sum fara at avgera valið. Her er munurin so lítil, at tað kann fara báðar vegir. Men sambært kanningunum kann tað eisini fara báðar vegir í Iowa, New Jersey, Minnesota, Georgia, Louisiana, Texas og í North Carolina.

George W. Bush, forseti, sum er republikanari, hevur seinastu dagarnar tikið lut í valstríðnum fyri at hjálpa sínum floksfeløgum, og undanmaður hansara, Bill Clinton, hevur hinvegin roynt at hjálpa demokratunum.